## Eva Joly í ES-tingið




Á ES-valinum í Fraklandi í gjár fekk flokkurin Europe Ecologie næstan 15 prosent av atkvøðunum, og sambært tíðindastovuni AFP var Eva Joly eitt av valevnum floksins, sum nú skal til Strasbourg og Bruxelles. Eva Joly er hálvur norðmaður og fekk herfyri drúgva umrøðu, tá hon var í Íslandi og kannaði yvisk viðurskifti í sambandi við fíggjarkreppuna har. Annars vann tann konservativi UMP-flokkurin hjá Nicolas Sarkozy, forseta ES-valið í Fraklandi. Flokkurin fekk 28 prosent av atkvøðunum, meðan Sosialistaflokkurinm PS fekk knappliga 18 prosent.

## Piratar í ES-tingið

Tá uppteljingin aftan á ES-valið í Svøríki í gjár var um at vera liðug, bendi alt á, at Piratflokkurin fekk 7,4 prosent av atkvøðunum, sum er nóg mikið til minst eitt umboð. Rick Falkvinge, floksformaður, var ovurfegin um úrslitið, og undan valinum segði hann, at alt oman fyri fýra prosent var nøktandi. Eitt av málunum hjá Piratflokkinum er, at tað skal ikki kosta nakað at taka filmar, tónleik og spøl niður á alnótini, og hetta hevur givið flokkinum nógvar veljarar millum svenskan ungdóm, skrivar TT. Rick Falkvinge sigur, at nú fer flokkurin at gera síni sjónarmið galdandi í ES eisini.

# Sum á ólavsøku

**Mentanarnáttina vóru so nógv fólk at síggja í havnargøtum, at dagurin lættliga kundi líknast við ólavsøku**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang og David Nilssen*



*Dansur og tónleikur myndaði stóran part av Mentanarnáttini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Fríggjakvøldið var Mentanarnátt hildin í Havn. Av tí at Tórshavnar kommuna í ár hátíðarheldur sín 100 ára føðingardag, var eyka nógv gjørt burturúr Mentanarnáttini hesa ferð. Skráin var pakkað við á leið 100 tiltøkum, ið fevndu um túnabólt, konsertir, listaframsýningar, útferðir, gongutúrar og øðrvísi upplivingar, so sum at Amtmansgarðurin var alment opin, og ein rundferð var við frásøgufólki í gamla kirkjugarði.

Gamli kommunuskúlagarðurin var gjørdur um til ein lítlan vøll, har túnabóltur var spældur gjøgnum dagin. Tað var við luttøku av gomlum kempum, so sum Kaj Leo Johannesen, Una Arge, Eli Hentze og Páll á Reynatúgvu. Hetta vísti seg at vera væl umtókt, líka sum handanin av riddarakrossinum, sum punkarnir úr 200 lótu. Tveir riddarakrossar vóru latnir undir Bryggjubakka. Ein fór til Magna Laksáfoss, og hin til Hergeir Staksberg. Báðir tóku riddarakrossin við einum smíli, og serliga tók Magni Laksáfoss tað við skálkinum, og bjóðaði 200 við á familjuskótalegu á Selatrað.

Frálíka veðrið gav høvi til at ganga og mala í havnargøtum, hyggja inn á gólvið til framsýningar hjá ymsu listafólkunum, at ogna sær bílig klæðir á endurnýtslusølu, njóta ein góðan bita, ein kaffimunn og hvat ein annars kann ynskja sær av tilboðum í hugnaligu havnagøtunum.

Dagurin var var rundaður av við tiltaki, sum Kunningarstovan í Havn skipaði fyri. Smáar heitluftsballónir vóru sendar upp í luftina frá Vaglinum, sum tóku seg so yndisliga út saman við bláa himmalinum, og var tað nakað, ið ikki er sætt í Føroyum fyrr. Júst sum Kunningarstovan lovaði.









*Í Reinsarínum skipaðu handlar fyri mótasýning, og framvið Havnará sýndi Beinta Vilhelmsen kjólar til øll høvi fram*
*Myndir: Jens Kristian Vang*